

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 06 - 2012

# Oljuverkfallið í Norra kostað eina milliard

15% av norsku oljuframleiðsluni er steðgað upp orsakað av verkfalli í oljuvinnuni. Hvønn dag missa feløgini og staturin 200 milliónir krónur. Umboð fyri Oljeindustriens Landsforening ávara ímóti avleiðingunum av verkfallinum, sum umframt at raka framleiðsluna av olju og gassi, eisini skaðar umdømið hjá norsku vinnuni sum veitari. Verkfallið hevur havt við sær, at fleiri stór framleiðandi olju- og gassfelt eru givin at framleiða, eitt nú Osebeg og Heidrun. Hesi framleiða 240.000 tunnur av olju um dagin umframt gass. Tað er serstakliga Statoil, sum kennir sviðan av verkfallinum. Fakfeløgini Industri Energi, Safe og Lederne hava koyrt meirar enn 700 av sínum limum í verkfall. Høvuðskrav teirra er, at arbeiðsgevararnir lata øllum starvsfólkum eina gávupensjón frá tey eru fylt 62 ár. OLF fær ikki tikið hetta við í samráðingarnar, tí tað er upp til einstøku fyritøkurnar sjálvar at hava pensjónsskipanir. Kelda - www.olf.no